# við Toftavatn



*Havgrímur hevur arbeitt sum entreprenørur í millum annað Yemen, Grønlandi og í Føroyum. – Einaferð eg arbeiddi í Noregi hitti eg ein einbýlismann, sum búði einsamallur inni í einum skógi, sigur Havgrímur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*- Eg eri ikki heilt ungur longur. Tí tekur tað sína tíð at mála takið, sigur Havgrímur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Ferføtt og tvíføtt**

Hinvegin er hann als ikki einsamallur her við vakra vatnið: Umframt 22 seyðir sínar og alt tað stóra fuglameingið beint við húsini, koma nógv fólk oman á líttlu sandstrondina, tá veðrið er til tað.

Henda dagin vit vitjaðu Havgrím vóru fýra ungfólk úr Runavík og Norðoyggjum komin higar dagin fyri við tjaldi sínum. Hetta er hann so vanur við, og nervar hann ikki í sínum dagliga virksemi.

Lættasti vegurin oman á vatnið er gjøgnum økið hjá Havgrími. Nú grasvøksturin er byrjaður, plagar hann at seta eitt skelti upp fyri at vísa fólki á eina aðra leið, sum gongur sunnanfyri hansara egna stykki.

- Men eg veit ikki. Onkur hevur verið so beinasamur at taka tað burtur, sigur hann við einum brosi.

> *Bara villgæsnar síggja meg ganga inni í húsinum, fara tær á flog beinanvegin*

**Ongatíð fyri einki**

Havgrímur er sum nevnt farin um tey 76 árini, men fyri hann er eingin orsøk at seta seg fyri einki. Hann hevur altíð okkurt at gera.

- Eg havi ikki tíð at ganga fyri einki. Tað er altíð okkurt at taka hond í.

- Her eru fleiri hús rundan um meg her, og tey krevja sjálvandi sítt av viðlíkahaldi og øðrum, sigur hann.

Umframt sethúsini hevur hann bæði hjall og eitt seyðahús. Hetta seyðahúsið var upprunaliga ein revagarður, men sum teir seinni bygdu uppaftur sum seyðahús.

- Eg fekk hjálp at leggja takið á. Annars gjørdi eg alt hitt sjálvur, greiðir hann eitt sindur errin frá.

**Ein umgang aftrat**

Henda morgunin vit hittu Havgrím við húsi síni var hann farin árla á føtur.

Longu tá tað fór at lýsa fyri degi um seks-tíðina, var hann klárur til dagsins verk. Veðrið var av tí allar fagrasta og eftir honum bíðaðu pensil og máling.

Hann hevði longu sett sær stigan uppá takið, tí nú skuldi tann seinna síðan málast. Hin síðan var longu gjørd.

- Eg má ansa mær eitt sindur. Eg eri ein slíkur klodsmajor, tí eg breyt mjødnina einaferðina tá eg datt.

- Tað gongur ikki so skjótt longur. Eg byrjaði at mála takið í gjár, og nú skal eg gera tað seinasta. Aftaná tað skal tað hvíta hava ein umgang aftrat, sigur hann.

## Villgæs í hundraðtali

**Tað eru kortini ikki bert tey tvíføttu, sum vitja økið hjá Havgrími. Hann fær eisini vitjan av stórum flokkum av villgæsum.**

**– Tær munnu vera fleiri hundrað í tali.**

Tær koma framvið Toftavatni saman við ungum sínum seint á sumri – í august og september.

Eitt er, at tær eta gras og annars traðka tað niður, men ein so stórur flokkur skvettir ikki heilt einki. Av hesi orsøk hevur Havgrímur eitt ávíst upptak eftir slíkar vitjanir.

- Tær koma allar niðan á stykkið um náttina. Tá eg so fari upp, síggja tær meg beinanvegin. Tað eru eini øgilig eygu, tær hava.

- Ja, eg behøvist ikki eingang at fara útum. Bara tær síggja meg ganga inni í húsinum, fara tær á flog beinanvegin, greiðir hann frá.



*Húsini við Toftavatn vórðu bygd í 1965. Tey krevja eisini sítt viðlíkahald*

*Mynd: Jens Kr. Vang*